## Kreppa í skipasmíði

Í Noregi vil ídnaðarfelagið hava stjórnina at taka stig til at bjarga arbeiðsplássunum á skipasmiðjunum. Í einum brævi til Trond Giske, vinnumálaráðharra skrivar ídnaðarfelagið, at tær bíleggingarnar, sum skipasmiðjurnar høvdu, tá fíggjarkreppan byrjaði fyri einum góðum ári síðani, fara at ganga undan nú. Ídnaðarfelagið og felagið hjá skipasmiðjunum hava havt uppskot um fleiri tiltøk, sum kunnu hjálpa skipasmiðjunum. Millum annað hava tey skotið upp, at tað almenna framskundar sínar ætlanir um at byggja skip til fiskirannsóknir, sjóverjuna og herflotan.



## Eta meiri fisk

Í Bretlandi eins og nógva aðrastaðni hevur fíggjarkreppan noytt fólk at hugsa seg betur um, tá tey brúka pengar. Tað er eisini galdandi, tá fólk keypa sær døgurðamat, og sambært heimasíðuni SefoodSource keypa bretar meiri av frystum matvørum nú enn fyrr. Millum tær frystu vørurnar, sum fólk keypa oftari nú enn fyrr, eru frystar fiskavørur, og tað sæst aftur á hagtølunum. SefoodSource skrivar, at teir fyrstu ellivu mánaðirnar í fjør keyptu bretar 5,1 prosent meiri av frystum fiskavørum enn teir ellivu mánaðirnar frammanundan. Tey seinastu trý árini er áhugin fyri frystum fiskavørum vaksin meiri enn 20 prosent, skrivar heimasíðan.

# Norðoyggjar vilja umsita eldraøkið

**Tosað verður um, at eldraøki skal leggjast út til kommunurnar at umsita. Klaksvíkar kommuna bjóðar sær til at vera royndarkommuna og átaka sær uppgávuna fyri økið. Riggar okkurt ikki, kann tað broytast, áðrenn alt økið verður lagt út, sigur Gunvá við Keldu, borgarstjóri í Klaksvík**

ELDRAØKIÐ
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Gunvá við Keldu, borgarstjóri í Klaksvík bíðar eftir fundarboðum frá Rósu Samuelsen, landsstýriskvinnu í almannamálum.

Fundurin skal snúgva seg um tilboðið frá Klaksvíkar kommunu, sum bjóðar seg til at vera royndarkommuna á eldraøkinum.

Uppskotið er, at Klaksvíkar kommuna skal vera royndarkommuna og skal yvirtaka eldraøkið fyri Norðoyggjar at reka og umsita. Hetta skal vera ein royndarverkætlan.

Gunvá við Keldu heldur, at Norðoyggjar eru best egnaðar sum øki at gera eina slíka roynd, tí Norðoyggjar eru ein søguliga og landafrøðiliga væl samanskipað eind, og kommunan hevur eina væl virkandi sosiala deild. Økið hevur haraftrat eina hóskandi støðd.

Sum er hava røktarheimið og tey bæði eldrasambýlini í Klaksvík somu leiðslu.

Annað eldrasambýlið í Klaksvík heldur til í leigaðum hølum, sum kommunan leigar, hitt er ein sjálvsognarstovnur. Náttarvaktirnar á báðum sambýlunum rindar kommunan.

- Tað einasta, sum Nærverkið skal av við, er starvsfólkini, sum vit so skulu løna, men afturfyri mugu vit hava eina upphædd til tað, sigur Gunvá við Keldu.

Hon heldur, at í royndartíðini kann vísa seg okkurt, ið krevur at verða rættað. Tá er betri, at hetta vrðuð funnið í eini royndarætlan, heldur enn at alt økið í einum verður lagt út til kommunurnar at umsita. At flyta eitt øki frá landinum til kommunurnar at umsita krevur í øllum førum nógva fyrireiking, sigur Gunvá við Keldu.




*Norðoyggjar hava felags r'ktarheim í Klaksvík, har eisini tvey eldrasambýli eru. Gunvá við Keldu, borgarstjóri er komin við uppskotinum um, at Klaksvíkar kommuna sum eina roynd yvirtekur eldraøkið, áðrenn alt málsøkið verður lagt út til kommunurnar at umsita*

## Stýrið fundast sjálvt

**Stýrið fyri Kringvarp Føroya vil ikki hava fun d við starvsfólkini á tíðindadeildini í Kringvarpi Føroya**

KRINGVARP FØROYA
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Sosialurin skrivaði í gjár, at starvsfólkini á tíðindadeildini í Kringvarpi Føroya høvdu biðið um fund við stýrið fyri kringvarpið.

Í greinini stóð, at stýrið ikki kann hava fund í hesi vikuni av ymiskum orsøkum, men at fundurin verður seinast í næstu viku.

Rúni Heinesen, formaður í kringvarpsstýrinum sigur, at fundurin verður ein vanligur stýrisfundur. Ætlanin er ikki at hava nakran fund við starvsfólkini.

# Fútaskrivstovan illa mannað

**Ov fáir løgfrøðingar eru á Fútaskrivstovuni, og hetta kann hava við sær, at nýggj mál fáa longri tíð um at koma fyri rættin**

RÆTTARMÁL

Beint nú stendur illa til við løgfrøðingum á Fútaskrivstovuni. Fútaskrivstovan er lítið meira enn hálvmannað.

Normeringin sigur hálvfimta løgfrøðing, men í løtuni eru tey bara hálvur triði.

Á nýggjárinum fór Linda Hesselberg, politiasessorur í farloyvi og kemur neyvan aftur fyrr enn í fyrsta lagi um eitt ár.

Avloysari kemur úr Danmark fyri hana 1. februar.

Seinastu tíðina hevur Hanna Vang, politifulltrúi arbeitt hálva tíð, men hálvan februar fer hon í annað starv.

Aftrat teimum koma fútin Karen Marie Olesen og varafúti Finn Ougaard.

Tað er Ríkisadvokaturin, sum ger av, nær søkt verður eftir fólki til fútaskrivstovurnar, og tí hevur fútin í Føroyum ikki ábyrgdina av, at tey eru so illa mannað.

Finn Ougaard, varafúti sigur, at við so lítlari manning fer tað at taka Fútaskrivstovuni longri tíð at avgreiða nýggj mál, sum koma inn. Tað fer at vera drúgvari frá tí, at eitt mál kemur inn, til tað er liðugt viðgjørt og kann sendast rættinum.



*Fútaskrivstovan við ov fáu løgfrøðingunum er nú yviri við Strond*